Útbjóðingarskriv

# Vælveru- og heilsutilboð í Tórshavnar Kommunu

Dagfest: 01.06.2025

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Býarskipanardeildin



## Hevur tú hug at bjóða fram almennan sauna ella líknandi í Tórshavnar kommunu?

Nú ber til at søkja um loyvi at bjóða fram almenn vælveru- og heilsutilboð, so sum sauna- , hitapottavirksemi á útvaldum økjum í Tórshavnar kommunu. Umsøkjarin leigar sostatt eitt øki frá Tórshavnar kommunu at skipa sítt vinnuliga virksemi á.
Søkjast kann um virksemi á trimum staðsetingum: í Álakeri í Havn, við Sjógv í Kollafirði og við Malarenda í Nólsoy. Sí uppteknaðu økini niðanfyri.

Verkætlanin hjá umsøkjaranum skal skipast sum eitt alment fólkaheilsufremjandi tilboð, almenninginum at gagni, har karmarnir bæði kunnu skipast á landi og á flótipalli á sjónum. Umsøkjarin ber sjálvur allan kostnaðin av síni verkætlan, og hevur samstundis fulla ábyrgd av virksemi sínum.

**Freistin at søkja er 1. Aug kl. 12:00.**

Umsøkjarin skal lata inn:

1. Yvirskipaða frágreiðing, sum lýsir ætlaða virksemið á tí staðnum, sum søkt verður um at leiga.

2. Tekningar av ætlaða virkseminum ella tí sum byggjast/uppsetast skal, við øllum neyðugum trygdaratlitum.

3. Frágreiðing av hvussu virksemið skal rekast, viðlíkahaldast og umsitast dagliga, umframt fíggjarætlan til virksemið.

4. Ætlan fyri bókingarskipan, atgongugjald, limaskipan og upplatingartíðir.

5. Upplýsingar um v-tal hjá umsøkjara og prógv um nøktandi fíggjarligt grundarlag fyri tí, sum søkt verður um.

Søkjast skal umvegis útboðsportalin hjá Tórshavnar kommunu. (utbod.torshavn.fo).
Til ber at skráseta seg sum umsøkjari/fyritøka á síðuni.

Á útboðsportalinum ber eisini til at seta kommununi spurningar í sambandi við umsóknina. **Freistin at seta spurningar er 10.juli kl. 16:00**

## Døming

Kommunan tilskilar sær rætt at velja best hóskandi verkætlanina í millum innkomnu uppskotini.
Tá mett verður um innkomnu umsóknirnar verður m.a. hugt at í hvønn mun verkætlanin er nøktandi í mun til:

- (Trygd) - Er tilboðið trygt og atkomiligt fyri flest allar brúkarar? *(Verður vektað 20% í metingini)*

- (Mett kostnaðarstøði) - Er tilboðið alment gagnlig, og er bíligt at fáa atgongd til? *(Verður vektað 20% í metingini)*

- (Byggilistarligt viðri) - Er loysnin arkitektonisk snøgg og tekur hon seg væl út og hóskar til staðsetingina? *(Verður vektað 30% í metingini)*

- (Tøki) - Er tilboðið javnan tøkt/opið? *(Verður vektað 20% í metingini)*

- (Burðardygd) – Er dentur lagdur á burðardygd í tilfari og orkuloysn? *(Verður vektað 10% í metingini)*

Tórshavnar kommuna tilskilar sær eisini rættin til at havna øllum innkomnu umsóknunum, um tær ikki vera mettar at vera nøktandi.

**Umsøkjarar fáa svar 15. Aug. 2025.**

## Sáttmáli

Eftir at vinnarin er funnin, verður leigusáttmáli gjørdur við vinnandi umsøkjaran fram til **1. Januar 2029** við møguleika um at leingja sáttmálan.

Áðrenn avtalan er tó endaligt galdandi, skal umsøkjarin fáa til høldar øll neyðug loyvi frá viðkomandi myndugleikum, t.d. frá byggimálsdeildini á Tórshavnar kommunu, Sjóvinnustýrinum (um talan er um flótandi bygging), heilsufrøðiligu starvsstovuni, og møguliga frá friðingarmyndugleikum.

Økisleigukostnaðurin fyri eitt øki á sjónum til t.d. flótipall er fyribils settur til kr. 5.000 árliga (u.mvg).

Økisleigukostnaðurin til leiguøki á landi við sjóvamálan er fyribils settur til kr. 42 pr. m² árliga.

Leigukostnaðurin verður møguliga tillagaður í endaliga leigusáttmálanum. Avtalur um íbindingar í kommunala leiðingarkervið verða gjørdar eftir tørvi.

Meira nágreinilig kunning um verkætlanina kann lesast í skjalinum *”Verkætlanarlýsing og leistur - Útboð av vælveruvirksemi í Tórshavnar Kommunu”, sum finst á torshavn.fo*

Verkætlanin hjá Tórshavnar kommunu at bjóða fram almenn vælveru- og heilsutilboð, so sum sauna- , hitapottavirksemi á útvaldum økjum í Tórshavnar kommunu er ein liður í eini yvirskipaðari ætlan um at bjóða fleiri økir fram í kommununi til líknandi endamál.
Kunnað verður meira um hetta seinni á *torshavn.fo.*

Býarskipanardeildin
TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagfest: 01.06.2025

**Øki at bjóða út**
**í fyrsta umgangi**

# TÓRSHAVN
í Álakeri




**Staðsetingaruppskot til skipaðar umstøður til sauna virksemi og líknandi.**
Tórshavn - í Álakeri

## Staðsetingaruppskot til skipaðar umstøður til sauna virksemi og líknandi.
Tórshavn - í Álakeri




**VIÐMERKINGAR**

- **Ognarviðurskifti:** Tórshavnar Havn eigur grundøkið.
- **Atkomuviðurskifti:** Sera góð.
- **Íbindingarumstøður: Sera** Góðar
- **Reinførisumstøður til sjósvimjing í økinum:** "Góð" (kanning gjørd 4. juni 2025)
- **Friðing**: Eingin
- **Annað: Ætlanir eru í økinum um undirhús, alment uppihald og almenn vesi.**

## Tilgjørd hugmynd við nýggjum undirhúsi og trivnaðarøki
Tórshavn - í Álakeri




Sum tilgjørda myndin vísir, arbeiðir Tórshavnar Havn við eini ætlan um at byggja eitt undirhús við vesi og eitt alment uppihaldsstað við sjóvarmálan mitt í Álakeri.

Gongst sum ætlað, verður liðugt at byggja undirhúsið í Álakeri á sumri í 2026.

Tað verður tá møguligt hjá tí, sum kemur at umsita vælveru- og trivnaðarøkið á grótkastinum, at leiga eitt rúm á 20m² til dømis til umklæðing í sambandi við ætlaða vælveruvirksemið á staðnum.

**Staðsetingaruppskot til skipaðar umstøður til sauna virksemi og líknandi.**
Tórshavn - í Álakeri




**Ognarviðurskifti:** Tórshavnar Havn eigur grundøkið.

**Atkomuviðurskifti: Góð, men** nakað tronglingt at koma til

**Íbindingarumstøður:** Góðar

**Reinførisumstøður til sjósvimjing í økinum:** "Góð" (kanning gjørd 4. juni 2025)

**Friðing**: Eingin

**Annað: Fritt fyri, men hetta er ein fløskuhálsur fyri bátaferðslu. (Trygdargirðing alneyðug)**

**Mynd av øki B í Álakeri**
Tórshavn - í Álakeri



# NÓLSOY
Á Malarenda



# KOLLAFJØRÐUR
Við Sjógv




**Staðsetingaruppskot til skipaðar umstøður til sauna virksemi og líknandi.**
Í Kollafirði - Við Sjógv og í Líðini



**Staðsetingaruppskot til skipaðar umstøður til sauna virksemi og líknandi.**
Í Kollafirði - Við Sjógv
160m²
A
Á landi
VIÐMERKINGAR
**Ognarviðurskifti:** Tórshavar Kommuna eigur økið
**Atkomuviðurskifti:** Sera góðir møguleikar. Lítil og eingin fyrireiking neyðug.
**Íbindingarumstøður:** Góðar umstøður. Nakað av leiðingum skulu hyljast í asfaltinum og leggjast í lendið.
**Reinførisumstøður til sjósvimjing í økinum:** "Vatngóðska í lagi" smb. kanningum hjá Umhvørvisdeildini 13.05.25
**Friðing**: Ongin friðing skrásett.
**Annað:** Økið verður í dag brúkt sum ruskbingjuøkið. Hetta má sostatt umskipast.




**Innrættaði neyst**
broytt byggisamtykt
**Renovation**
Fyri miðbygdina
**Trivnaðarøki**
kajakk og sjóbundið spæl
**Miðstaður**
Felagsøki, spæl
og bálstaður
**Felagsveltur**
vakstrarhús við
flógvum vatni
**Demmaður**
**Hylur**
gongusamband
yvir um ánnað
**Vælveruøki**
Sauna og
hitapottar
**Sandur**
við settum gróti sum
brimverja
**Gonguleið**
undir
landsveg
**Bygdarsavn**
og kunningarstova
**Gonguleið**
Plantaður vallgarður
Útisavn við kunnandi
skeltum
Tekningin vísir framtíðarátøkini í heildarætlanini fyri miðstaðarøkið í Kollafirði, sum varð samtykt í Býráðnum á vári 2025.
Ætlanin verður framd í stigum
eftir politiskari raðfesting

**Staðsetingaruppskot til skipaðar umstøður til sauna virksemi og líknandi.**

Í Kollafirði - Við Sjógv




VIÐMERKINGAR

**Ognarviðurskifti:** Tórshavar Kommuna eigur økið

**Atkomuviðurskifti:** Góðir møguleikar. Smávegis fyrireiking neyðug.

**Íbindingarumstøður:** Góðar umstøður. Nakað av leiðingum skulu hyljast í asfaltinum og leggjast í lendið.

**Reinførisumstøður til sjósvimjing í økinum:** "Góð vatngóðska" smb. kanningum hjá Umhvørvisdeildini (13. juni 2025)

**Friðing**: Ongin friðing skrásett.

**Annað:** Bakkafrost hevur virksemi í økinum, og tískil er alneyðugt, at svimjiøkið verur innigirt.